skemt

Lagt til rættis:Jákup Mørk

# Í rangastrúpan

**Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini vði teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.**

### Væl kókað

»Coaching – eitt amboð til betri at leiða tíni starvsfólk«

*Lýsingatekstur*



### Knortlut atkoma

»Hvussu man vera at búgva í Gøtugjógv«

*Spurningur frá lesara*

### Er tað nú so trupult?

»Ætlanin við portalinum er millum annað, at tað gera tað lætt at finna kvinnur við røttu førleikunum«

*vikublad.fo*

## Orðaspæl

Verður flotin lagdur, nú Showmenn gevast?

# Nær er tygara tørn?



Tánakrirold-boysleikararnorðanfjørðs herfyri vóru til eina kapping í Vági eitt vikuskifti, leigaðu teir seg inn í eini hús har. Í hesum húsum var eitt wc, sum var gjørt sum eitt bíðirúm, har tey vitjandi t.d. kundu stytta sær um stundir við at lesa bløðini. Annars talar myndin fyri seg.

# Tórshavn á norskum



Við eini romantiskari ímynd av, hvussu nær sjónum føroyingar búgva, hevur norska blaðið, Camping og fritid drúgva grein um Føroyar í seinastu útgávu sínari. Fyri føroyingar man myndin tó ikki vera serliga vælkend. Tí gaman í búgva vit nær sjónum, men ikki heilt so nær, sum norska blaðið vil vera við.

**-mørk**

sosialurin